MENTAMÁLARÁÐIÐ

**Dagur:** 7. mai 2009
**Skrátal:** 70-36200
**Máltal:** 090443 -/11

# Leiðreglur í sambandi við landsroyndina 2008 á 4. og 6. floksstigi

Við atlitið at § 2 í reglugerð um landsroynd, dagfest 4. apríl 2008 og dagførd 7. mai 2009, eru hesar leiðreglur galdandi í sambandi við landsroyndina 2009:

Landsroyndin fatar um lærugreinirnar: Føroyskt, støddfrøði og náttúru og tøkni á 4. og 6. floksstigi. Royndin í einstøku lærugreinunum verður hildin sambært tíðarætlanini dagfest 7. mai 2009, ið er send skúlunum.

Skúlaleiðarin avgerð í hvørjum hølum landsroyndin verður hildin. Royndin kann verða hildin í vanligu flokshølunum há næmingunum ella í øðrum hølum í skúlanum. Landsroyndin byrjar til ta frammanundan ásettu tíðina. Hølið skal latast upp í góðari tíð, soleiðis at næmingarnir sita á sínum plássi, tá ið royndin byrjar. Brævbjálvarnir við uppgávunum skulu latast upp inni í hølunum, har landsroyndin verður hildin. Lærugrein, dagfesting, klokkutíð og vegleiðing er prentað á brævbjálvarnar.

## Uppgávusvarini og næmingayvirlit

Tá ið royndin er liðug, skal skúlin senda uppgávurnar saman við næmingayvirliti til Mentamálaráðið.

Uppgávurnar og næmingayvirlitið í hvørjari lærugrein skulu leggjast í brævbjálvar, ið síðani verða sendir Mentamálaráðnum sum innskrivað bræv.

Oyðublaðið 'næmingayvirlit' er lagt hjá og liggur eisini á heimasíðu Mentamálaráðsins www.mmr.fo undir fólkaskúlin / landsroynd. Møguligar viðmerkingar skulu skrivast á næmingayvirlitið.

Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ (+298) 35 50 50 • (+298) 35 50 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

**Niðanfyri er ásett, hvat galdandi er í einstøku lærugreinunum í landsroyndini:**

## Føroyskt 4. flokkur

## Lesa og skilja tekst

Næmingarnir fáa **45** minuttir til uppgávuna.

Svarini verða skrivað á uppgávuarkið.

Næmingarnar kunnu skriva við blýanti.

At kenna klokkuna er partur av uppgávuni **í føroyskum, lesa og skilja tekst.** Tí er neyðugt, at ein **klokka**, ið allir næmingar kunnu síggja, er í hølunum, har landsroyndin fer fram.

## Fyrisøgn

Næmingarnir fáa **45** minuttir til fyrisøgnina.

Lærarin í føroyskum[1], ið skal lesa fyrisøgnina, eigur at lesa uppgávuna ígjøgnum, áðrenn lisið verður fyri.

Lærarin lesur fyrst allan fyrisøgnina fyri næmingunum. Síðani lesur hann fyrisøgnina sambært vegleiðing á lærararkinum. Eitt av umsjónarfólkunum skal fylgja við, at rætt verður lisið. Næmingarnir skulu hava í minsta lagi 10 minuttir til at gjøgnumganga fyrisøgnina.

Næmingarnir kunnu hava orðalistar og orðabøkur, sum verða nýtt í undirvísingini í føroyskum í 4. flokki, við sær til royndina.

Næmingarnir kunnu skriva við blýanti.

[1] Sum meginregla eigur tað at verða lærarin, sum hevur flokkin í føroyskum, sum lesur fyrisøgnina fyri næmingunum. Í undantaksføri kann víkjast frá hesi áseting.

## Støddfrøði 4. flokkur

Næmingarnir fáa **45** minuttir til uppgávuna.

Svarini verða skrivað á uppgávuarkið.

Næmingarnir kunnu hava lærubøkur og annað tilfar, sum verða nýtt í undirvísingini í støddfrøði í 4. flokki, við sær til royndina.

Hjálpartól: Vanlig tekniamboð og spegl.

Næmingarnar kunnu skriva við blýanti.

Viðmerkjast skal, at næmingarnir ikki kunnu nýta lummaroknara.

## Náttúra og tøkni 4. flokkur

Næmingarnir fáa **45** minuttir til royndina.

Svarini verða skrivað á uppgávuarkið.

Næmingarnir kunnu hava lærubøkur, atlas umframt annað tilfar, sum verður nýtt í undirvísingini í náttúru og tøkni í 4. flokki, við til royndina.

Næmingarnir kunnu skriva við blýanti.

# Føroyskt 6. flokkur

## Lesa og skilja tekst

Næmingarnir fáa **45** minuttir til uppgávuna.

Svarini verða skrivað á uppgávuarkið.

Næmingarnir kunnu skriva við blýanti.

At kenna klokkuna er partur av uppgávuni **í føroyskum, lesa og skilja tekst.** Tí er er neyðugt, at ein **klokka**, ið allir næmingar kunnu síggja, er í hølunum, har landsroyndin fer fram.

## Mállæra

Næmingarnir fáa **30** minuttir til uppgávuna.

Svarini verða skrivað á uppgávuarkið.

Næmingarnir kunnu hava orðalistar og orðabøkur, sum verða nýtt í undirvísingini í føroyskum í 6. flokki, við sær til royndina.

Næmingarnir kunnu skriva við blýanti.

## Fyrisøgn

Næmingarnir fáa **45** minuttir til uppgávuna.

Lærarin í føroyskum[2], ið skal lesa fyrisøgnina, eigur at lesa hana ígjøgnum, áðrenn lisið verður fyri.

Lærarin lesur fyrst allan fyrisøgnina fyri næmingunum. Síðani lesur hann fyrisøgnina sambært vegleiðing á læraraarkinum. Eitt av umsjónarfólkunum skal fylgja við, at rætt verður lisið. Næmingarnir skulu hava í minsta lagi 10 minuttir til at gjøgnumganga fyrisøgnina.

[2] Sum meginregla eigur tað at verða lærarin, sum hevur flokkin í føroyskum, sum lesur fyrisøgnina fyri næmingunum. Í undantaksføri kann víkjast frá hesi áseting.

## Støddfrøði 6. flokkur

Næmingarnir fáa **60** minuttir til uppgávuna.

Svarini verða skrivað á uppgávuarkið.

Næmingarnir kunnu hava lærubøkur og annað tilfar, sum verður nýtt í vanligu undirvísingini í støddfrøði í 6. flokki, við sær til royndina.

Hjálpartól: Vanlig tekniamboð og spegl.

Næmingarnar kunnu skriva við blýanti.

Viðmerkjast skal, at næmingarnir kunnu ikki nýta lummaroknara.

## Náttúra og tøkni 6. flokkur

Næmingarnir fáa **60** minuttir til uppgávuna.

Svarini verða skrivað á uppgávuarkið.

Næmingarnir kunnu hava lærubøkur, atlas umframt annað tilfar, sum verður nýtt í vanligu undirvísingini í náttúru og tøkni i 6. flokki, við sær til royndina.

Næmingarnir kunnu skriva við blýanti.

Vinarliga

**Mentamálaráðið**